# Jógvan setti luftborna framsýning

**»Aethereus« merkir luftborin, loftkendur. Hetta er eisini heitið á framsýning hjá Vígdis Petersen í Mentamálaráðnum, sum nýggi mentamálaráðharrin setti hósdagin**

LISTAFRAMSÝNING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Ein av fyrstu uppgávunum hjá nýggja mentamálaráðharranum, Jógvani á Lakjuni, var at lata upp eina listaframsýning í Mentamálaráðnum við Hoyvíksvegin í Havn.

Tað er 38 ára gamla Vígdis Petersen úr Havn, sum sýnir fram. Hon er útbúgvin keramikarifrá Danmarks Designskole, og fyri at styrkja um undirvísingarførleikan í m.ø. keramikki og glasi nemur hon sær víðari útbúgving á IT-Universitetet í Keypmannahavn innan digitala estetikk, har m.a. 3 dimensionell modellering og video inngongur. Vígdis hevur eisini tikið lut á nógvum viðkomandi skeiðum og verið námsferðir m.a. í New York, Litava og París.

Yvirskriftin fyri hesa framsýning er Aethereus, sum merkir loftborin, loftkendur. Umframt at vera loftborin, útstrálar framsýningin eisini einfaldni og frið.

Framsýningin heldur fram til 31. mars 2004, og opið er mánadag til hósdag kl 8-16, fríggjadag 8-15.







Alfevnd lýsingarstova á Skálafjørðinum

**Nú hendi tað:** Ein lýsingarstova er komin á Skálafjørðinum, sum veitir somu tænastur sum aðrar lýsingarstovur í landinum. Fyri lagaligar prísir.
Hjá Krea arbeiðir útbúgvið fólk, og hetta tryggjar viðskiftafólkunum, at vøran og tænastan er í lagi.

Um tað er ein heimasíða, ein lýsing ella eitt búmerki, sum skal gerast. Ein handil ella bilur, sum skal prýðast, - ja, so kunnu vit bjóða eina kappingarføra loysn.

KREA.FO

Heiðavegur 15 | FO-600 Saltangará | Tel 44 93 39 | krea@krea.fo | www.krea.fo


# Gospelkonsert í Atlantis

KONSERT
*Tíðindaskriv*

Í kvøld, leygarkvøldið, kl. 21.00 verður gospelkonsert í Atlantis.

Konsertin er ókeypis, men pláss er bert fyri 103 fólkum, siga fyrireikararnir. Men tað er bara at fara í Atlantis at heinta sær eitt atgongumerki í góðari tíð – og um øll atgongumerkini verða heintað, so verður skipað fyri nýggjari konsert.

Bólkarnir á konsertini verða Credo, Thirst og Unify, og er lagt upp til eina rimmarkonsert, siga fyrireikararnir.

## Credo

Hans Andrias, Alvin og Leivur møttust í bólkinum Chain, ið teir saman við tveimum øðrum tónleikarum komu at spæla saman við. Alvin og Hans Andrias hava, síðan teir møttust, gjørt sangir saman. Hans Andrias skrivar tekstir, og Alvin ger so lag til, men báðir ávirka hvønn annan eisini. Tónleikurin er fyri tað mesta poppur.

## Thirst

Eru úr Eysturoynni, tey eru trý, sum hava stovnað ein nýggjan bólk, tey syngja øll og Jákup spælir eisini keyboard.

## Unify

Er mannaður við fólki úr samkomuni Getsemane. Tey syngja mest lovsangir klæddir í egnum búna.

Øll eru hjartaliga vælkomin, siga fyrireikararnir.



# Nú hækkar pensjónin upp í 10.000 krónur um mánaðin

**Samgongan ætlar rættiliga at gera hol í sjógvin á eftirlønarøkinum og tey komandi árini skal pensjónin hækkast munandi**

EFTIRLØN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Nú skal eftirlønin til tey eldru hækkast munandi.

Tað sigur Hans Pauli Strøm, nýggjur landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum.

Hann sigur, at samgongan, sum nú er skipað, hevur sett sær fyri at ætkka eftirlønirnar munandi.

Og samgongan hevur eisini avtalað, hvussu tað skal gerast.

Sostatt hevur hendan nýggja samgongan sett sær fyri at gera rættiligt hol í sjógvin á eftirlønarøkinum.

Undanfarna samgongan hevði eisini eina góða eftirlønarskipan sum eitt av sínum aðalmálum. Men hóast henni untist seks ár við róðrið á almennu skútuni, eydnaðist tað ikki at semjast um nakra eftirlønarskipan.

Men, nú nýggj bátsmanning er tørnað til í Tinganesi, er eitt rættiligt frambrot hent í eftirlønarmálinum.

Hans Pauli Strøm, nýggjur landsstýrismaður, sigur, at nú er í hvussu so er veruligt gongd komin á royndirnar at fáa eina virðiliga eftirlønarskipan setta í verk.



*Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, sigur, at nú er eitt langt og hart stríðsmál í føroyskum politikki lagt afturum og hann er ógvuliga fegin um, at eftirlønin nú verður munandi hækkað*

## Byggir á tríggjar súlur

– Eftir tí, sum samgongan hevur avtalað, byggir nýggja eftirlønarskipanin á tríggjar súlur: Tvær almennar súlur og eina privata súlu.

Og Hans Pauli Strøm dylir ikki fyri, at hann er serliga fegin um, at tað eydnaðist at finna semju um eina eftirlønarskipan á tveimum almennum súlum, tí sostatt er talan um eina samhaldsfasta eftirlønarskipan, har øll, sum arbeiða og allir arbeiðsgevarar betala inn eftir førimuni, men har øll fáa líka nógv úr henni aftur, sama, hvussu nógv, tey hava forvunnið í arbeiðslívinum.

Tær báðar almennu súlurnar, sum eftirlønin byggir á, eru fólkaspensjónin og samhaldsfasti eftirlønargrunnurin.

Privata súlan undir eftirlønarskipanini, eru tær avtalur, sum hvørt einstakt fakfelag sær ger eftir hvat tað heldur vera rætt.

– Við at leggja stóran dent á samhaldsfasta eftirlønargrunnin, ber til at fáa eina skipan, sum rættiliga skjótt kann veita eina munandi hægri eftirløn enn fólk fáa í dag.

– Skuldi talan harafturímóti bara verið um eina eftirlønarskipan, har hvør einstakur skuldi spara upp til sína egnu eftirløn, hevði tað tikið eini 40 ár, áðrenn nakar hevði fingið eina munagóða eftirløn, vísa útrokningar, sum fyrr eru gjørdar.

– Eftirlønarspurningurin er so mikið átrokandi, at tað kann ongin bíða eftir, sigur landsstýrismaðurin.

Hann leggur afturat, at við tað, at eftirlønin bæði skal byggja á eina samhaldsfasta skipan og eina privata skipan, skuldi hetta verið ein skipan, sum øll skuldi kunna tikið undir við.

Endamálið við hesari eftirlønini er, at tað almenna skal taka sær teirri grundleggjandi pensjónini, so at øll fáa eina hampiliga eftirløn, eisini hóast tey ongantíð hava verið á arbeiðsmarknaðinum.

Men so kunnu tey, sum eru á arbeiðsmarknaðinum, byggja sína eftirløn út eftir tørvi við serligum eftirlønum, sum tey sjálvi betala inn í, saman við arbeiðsgevarum um.

## Hækkar upp á 2.500 krónur

Hans Pauli Strøm sigur, at í nýggju eftirlønarskipanini hjá samgonguni verður fólkapensjónin varðveitt, sum hon er.

– Men framyvir verður tað eisini so, at øll fólkapensjónin, sum hon er, skal prístalsviðgerast. Tað merkir, at fólkapensjónin fer at hækka av sær sjálvum, so hvørt sum prísirnir í samfelagnum hækka.

– Í løtuni verður grundupphæddin, sum er tann størsti parturin av fólkapensjónini, ikki prístalsviðgjørd.

Samstundis skulu bæði løntakarar og arbeiðsgevarar betala meiri inn í samhaldsfasta eftirlønargrunnin.

Í løtuni betala løntakarar 0,5% av løinini í samhaldsfasta eftirlønargrunnin og arbeiðsgevarar betala 0,5% í grunnnin av øllum lønunum, teir betala.

Longu 1. januar í 2005 skal hvør partur betala eitt 0,25% meiri til samhaldsfasta, 1. januar í 2006 hækkar gjaldið 0,25% afturat. Men 1. januar í 2007, hækkar gjaldið so aftur 0,5%.

– Sostatt skulu løntakarar og arbeiðsgevarar betala 1% afturat inn í samhaldsfasta, so at gjaldið tilsamans kemur upp á 1,5% frá hvørjum parti. Prosentini, sum arbeiðsgevarar betala eru sjálvandi av teimum útgoldnu lønunum.

– Í løtuni er gjaldið úr samhaldsfasta góðar 700 krónur um mánaðin. Men økta inngjaldið førir við sær, at longu um fimm ár, er gjaldið úr grunninum komið komið upp á yvir 2.500 krónur um mánaðin í part.

Samstundis verður fólkapensjónin góðar 7.500 krónur um mánaðin.

Saman við fólkapensjónini fer hetta sostatt at geva øllum støkum pensjonistum eina eftirløn upp á yvir 10.000 krónur um mánaðin, sigur Hans Pauli Strøm.

Hinvegin fara hjún at fáa næstan 17.000 krónur í eftirløn um mánaðin um fimm ár.

## Grundstøðið lagt

Hans Pauli Strøm sigur, at hetta verður sostatt grundstøðið undir framtíðareftirlønarskipanini.

Hann sigur, av av tí, at skattgjaldarar hava ein botnfrádrátt og at pensjonistar harafturat hava ein serligan pensjonistafrádrátt, verður tað ógvuliga lítið, sum skal betalast í skatti av pensjónini.

Men harafturat situr ein nevnd, sum skal arbeiða fyri at finna eina semju ímillum partarnar á arbeiðsmarknaðinum um eina privata eftirløn.

– Talan verður tó um eitt minstakrav til, hvussu stóran part av lønini, arbeiðsgevarar og løntakarar skulu betala inn í eina privata eftirlønarskipan. Men halda tey tað vera rætt, kunnu tey betala meiri enn minstakravið ásetir.

– Men nú nevndin fær greið boð um, hvørjar tær politiskar ætlanir eru, kann hon verða liðug rættiliga skjótt.

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum sigur, at við hesi semjuni er eitt stórt stríðsmál í føroyskum politikki lagt afturum.

– Samstundis er støðið lagt undir eina eftirløn, sum veruliga munar. Og verður semja um tað seinni, ber altíð til at byggja skipanina út, kanska soleiðis at gjaldið til samhaldsfasta veksur eitt sindur afturat.

# Beinleiðis frekt at koma við einum skattalætta sum hesum

**– Eg skilji ikki, at javnaðarflokkurin hevur skrivað undir eitt samgonguskjal við einum skattalætta sum hesum, sigur forkvinnan í Havnar Arbeiðsmannafelag**

SKATTALÆTTI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta er beinleiðis frekt. Vígdis Johannesen, forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag, hevur eisini eina greiða meining um skattalættan, sum hendan samgongan hevur lovað.

– Hesin skattalættin er tað reina makkverk og hann er so ósosialur, sum hann kann vera, sigur hon í stuttari viðmerking.



*– Skattalættin hjá fakfeløgunum er eitt makkverk og hann er so ósosialur, sum hann kann vera, sigur Vìgdis Johannesen, forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag*

Hon sigur, at ætlanin hjá smgonguni ber í sær, at tey, sum hava lítla inntøku, fáa eisini lítið og onki í skattalætta, men tey, sum hava høgar inntøkur, fáa eisini høgan skattalætta.

– Eg skilji væl at sambandsflokkurin ikki tordi at kunngera, hvat skattalættin gekk út uppá í valstríðnum.

Men tað, sum hon hinvegin als ikki skilir, er, at javnaðarflokkurin hevur skrivað undir eitt samgonguskjal við einum skattalætta, sum hesum.

– Hann kallar seg arbeiðaraflokk, so tað undrar meg stórliga.

Men er tað ikki rætt at broyta marginalskattin, so at skatturin av teimum einast forvunnu krónum, ikki verður so stórur.

– Vilja teir broyta skattastigan, skulu teir gera tað frá tí rætta endanum, so at tey, sum forvinna lítið, fáa ein lætta. men, sum er, verður byrjað í hinum endanum, so at tey, sum hava góða løn frammanundan, nú skulu fáa meiri, sigur Vígdis Johannesen.

– Undan valinum varð tosað um skattalætta til tey lágløntu, men tað er beinleiðis frekt at koma við hesum.

## Undir ongum umstøðum

Havnar Arbeiðskvinnufelag hevur altíð verið ímóti at taka samráðingar upp um at halda aftur við lønarkrøvunum afturfyri at fáa skattalætta.

–Tað fara vit undir ongum umstøðum at vera við í, tí okkara uppgáva er at fáa limum okkara so góð kor sum gjørligt. Og nú samgongan kemur við hesum makkverkinum, kemur tað als ikki uppá tal, sigur Vígdis Johannesen.